

**FM**

*– Vit verða nokk ikki Føroyameistarar í ár, men kanska um eini trý ár, siga tær báðar Jórun Maria Dalsgård og Sólvá Álaberg, sum rógva við 5-mannafarinum Báran*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Rógva sum fyri lívinum

**HVALVÍK – Okkum dámar væl at rógva. Tað er serliga stuttligt, tá man rør ímóti bátum úr øðrum feløgum, siga tveir av ungu rógvarunum í Hvalvíkar-Streymnesar Róðrarfelagi. Leygardagin skulu tær báðar Sólvá Álaberg og Jórun Maria Dalsgård aðru ferð í ár til ein FM-róður umborð á báti teirra "Báran".**

Snorri Brend

Klokkan var ikki nógv meiri enn hálvgum trý, tá tær báðar settu kós ímóti róðrarneystinum.

Tær vildu vera í góðari tíð henda mikudagin í farnu viku, tí klokkan trý stundisliga skuldi venjingin byrja.

Skal ein røkka góðum úrslitum í hesi ítróttargreinini, er neyðugt at venja og venja uppaftur meiri. Serliga um ein skal koma longur fram, enn við teir báðar seinastu róðrarnar.

Á bygdarstevnuni á Skála herfyri var eisini kapproður á skránni. Men her kundi gingið munandi betri hjá Báruni. Tær gjørdust nr. 12 av 12.

– Vit vóru so nógv nógv yngstar av øllum. Vit eru jú bara 11 og 12 ár, meðan næstan allar hinar vóru nógv eldri enn vit, eini 14-15 ár.

– Men vit hava ikki mist vónina um at gera tað betri næstu ferð, siga teir báðar ágrýtnu rógvararnir, 12 ára gamla Sólvá og 11 ára gamla Jórun Maria.

## Koyra á

Undirtøkan til barnaróðrarnar hevur verið alsamt vaksandi, og á norðoyastevnuni um vikuskiftið var neyðugt at býta gentumanningarnar upp í tveir róðrar.

Úti í teimum einstøku feløgunum verður eisini nógv gjørt við venjingina. Her í Hvalvíkar-Streymnesar Róðrarfelagi venja Sólva og Jórun Maria og allar hinar umborð á Báruni so ofta sum tríggjar ferðir um vikuna.

– Fyrr vandu vit mánadag, mikudag og fríggjadag, men nú ið stevnurnar byrja er venjingin broytt til mánadag, mikudag og hósdag, greiða tær frá.

Tær eru tó ikki einsamallar í neysti ella báti, tí felagið hevur sett ikki færri enn tríggjar venjarar til teirra - Miriam, Ingibjørg og Hans Jákup, ið øll hava róð kapp áður.

– Jú, tey koyra hart á okkum. Men vit halda, at tey duga ordiliga væl, eru tær báðar Sólvá og Jórun Maria samdar um.

**» Vit vóru so nógv nógv yngstar av øllum. Vit eru jú bara 11 og 12 ár, meðan næstan allar hinar vóru nógv eldri enn vit**

## Ikki aftast

Mikudagin var veðrið teimum til vildar, og tí var eftir ætlanini helst farið beinleiðis í bátin.

– Um veðrið ikki er so gott, so plaga vit at seta okkum við rógvimaskinurnar sum felagið eigur, sigur tær báðar.

Um vikuskiftið fingu tær aftur víst hvat tær dugdu, men komu kortini ikki í finalurnar í barnaróðrinum fyri gentur.

Men nú stendur Sundalagsstevnan fyri framman, og skulu tær hesaferð rógva í heimasjógvi. Hvussu man fara at ganga hjá Báruni leygardagin?

– Tað er ringt at siga. Men vit ætla okkum ikki at verða aftast, sláa Sólvá og Jórun Maria rimmarfast.

## Fakta

**Kapproður í Hvalvík**
Heiti: Sundalagsstevna í Hvalvík
Títtleiki: Triðja hvørt ár
Fyriskipari: Hvalvíkar-Streymnesar Róðrarfelag
Inntøka: Hvalvíkar-Streymnesar Róðrarfelag
Teinar: 1000, 1500 og 2000 metrar